# Ársins Songrødd í Klaksvík

**Leygarkvøldi› var› skipa› fyri ø›rum innlei›andi umfarinum í kappingini um Ársins Songrødd í Klaksvík. Nicolina Rubeksen, sum fylti sekstan leygardagin, fekk eina væl uppiborna fø›ingardagsgávu, tá hon vann kappingina**

Fróði Løkságarð

Eini 315 fólk høvdu leita› sær í Lognbrá í Klaksvík leygarkvøldi›, tá skipa› var fyri tí næsta av innlei›andi umførunum í kappingini Ársins Songrødd 2000. Dyrnar lótu upp klokkan 11 leygarkvøldi›, og á midnátt var klárt at fara undir sjálva kappingina.

Fimm luttakarar høvdu tekna› seg til kappingina í Klaksvík. Kappingin í ár er naka› broytt í mun til kappingarnar undanfarin ár. Í ár eru ta› ikki fyrireikararnir einsamallir sum hava avgjørt hvørji løg eru í at velja. Á heimasí›uni hjá kappingini var møguleiki hjá fólki at fara inn og stemma uppá hvørji løg luttakarnir skuldu hava at velja ímillum. Hóast hesa broytingina, var ta› ikki tann stóra breiddin yvir tilfarinum luttakararnir í Klaksvík vældu at framføra. Teir flestu luttakararnir hildu seg til tey somu løgini, og hetta var á ein hátt nokkso spell.

Teir fimm luttakararnir í innlei›andi umfarinum í klaksvík vóru Julianna Sivertsen, Jógvan á Høvdanum, yngri, Unn Tómasson, Nicolina Rubeksen og Sólger› Joensen. Tr‡ ymisk løg vóru framførd av teimum 5 luttakarunum.

### Totalt Langt Úti

Mest originalu framfør›sluna hetta kvøldi› hev›i Jógvan á Høvdanum, yngri, sum til høvi› hev›i gjørt eina føroyska útgávu av lagnum Sha La La La La. Sjálvt um or›ini ljó›a›u naka› improvisera›i og tilvildarlig, so megna›i Jógvan vi› síni lívligu upptra›kan at fáa lív í áhoyrarafjøldina. Skuldi sangarin sjálvur givi› eitt bo› uppá framfør›sluna, so er ikki óhugsandi at or›ini høvdu veri› "Totalt langt úti!"

Einki er at taka seg aftur í, at ta› eru nógvar gó›ar sangrøddir i› goyma seg runt landi›. Flestu av luttakarunum komu rættuliga væl frá sínum framførslum. Hóast at allir luttakararnir høvdu gó›ar framfør›slur, er ikki trúligt, at dómararnir høvdu stóru trupulleikarnar at koma til eina ni›urstø›u, um hvør skuldi hava fyrsta plássi›, framfør›slan hjá Nicolinu Rubeksen var nevniliga naka› heilt fyri seg.

### Fø›ingardag og fyrstapláss

Nicolina Rubeksen, sum fylti 16 leygardagin, hev›i eina rættuliga sannførandi framfør›slu av lagnum Tell Him hjá Celine Dion, sum fekk flestu áhoyrarnar at klípa seg í armin fyri at vita um hetta var veruligt. Eisini Sólger› Joensen i› gjørdist nummar tvey í innlei›andi umfarinum í Lognbrá, hev›i valt at syngja henda sangin hjá Celine Dion. Eisini hon, kom væl frá hesi krevjandi uppgávu.

Eftir øllum at døma, so vóru øll sum vóru í Lognbrá leygarkvøldi›, væl nøgd vi› úrsliti›. Rómurin var stórur tá i› vinnararnir blivu róptir uppá pallin. Umframt fyrsiskipararnar so vóru eisini Jógvan Hansen úr Aria og Ársins Songrødd Arnfrí› Lützen vi› á pallinum, tá vinnararnir skuldu hei›rast vi› gávum og ø›rum.

### Arviligt

Ta› er ilt at siga, um evnini at syngja eru arvilig, men í øllum førum, so er Nicolina Rubeksen i› vann innlei›andi umfari› í Klaksvík systkinabarn Arnfrí› Lützen, sum í løtuni kann pr‡›a seg vi› heitinum ársins songrødd.

Yngd hitti vinnaran Nicolinu Rubeksen aftana kappingina, sum vera man so var hon sera vælnøgd, og ta› tyktist ikki sum hon heilt hev›i fingi› vænt seg vi› tankan, at hon var komin ví›ari til finaluna.

– Hetta er ótrúligt. Sjálvandi hev›i eg ikki vænta› at vunni›, men tá eg hev›i hoyrt hinar luttakararnar, so hev›i eg eina vón um, at eg kundi fáa eina hampuliga placering, men at ta› skuldi blíva so gott sum hetta, ta› er bara deiligt.

Nicolina sigur ví›ari, at nervarnir rættuliga gjørdu um seg á›renn hon fór á pallin. – Eg ristist ordiliga illa, eisini me›an eg sang merkti eg at beini skulvu undir mær. Ví›ari sigur Nicolina, at hetta var fyrstu fer› nakrantí› at hon hev›i sungi› alment. Frammanundan hev›i hon bara sungi› heima, so eingin uttan familjan var vitandi um henda songfuglin.

### Ikki melda til sjálv

Nicolina hev›i ikki sjálvt melda seg til kappingina. – Ta› tordi eg ikki. Ein vinkona tekna›i meg, sigur hon smæ›in. Nicolina hev›i ikki langa tí› at venja í. Ikki fyrr enn tríggjar dagar framman undan kappingini, fekk hon fløguna vi› lagnum á, sum hon skuldi syngja. – Av fyrstan tí› ætla›i eg at syngja eitt lag hjá Britney Spears, men ein vinkona sum hoyrdi meg venja, helt ikki at ta› rigga›i serliga væl. Nicolina sigur ví›ari, at hetta fekk hana at hugsa seg um einafer› afturat. Hon vældi so Celine Dion í sta›in. Celine er eisini ein av yndis songkvinnunum hjá Nicolinu, saman vi› eitt nú Mariah Carey og Whitney Houston. Tónleikin hjá bólkum sum Vengaboys, hevur hon ikki nógv til yvirs fyri. – Ta› er ta› reina skrambul.

10. juni ver›ur sjálv finalan í kappingini hildin í Badminton høllini í Havn. – Hatta vi› finaluni havi eg slett ikki fingi› tí› at hugsa um enn, men vænti heilt sikkurt at ta› ver›ur spennandi. Vit spurdu eisini Nicolinu, um hon nú fór at gera naka› serligt burtur úr til finaluna. – Eg fari sjálvandi at royna at venja eitt sindur, ta› er ta› einasta man kann gera. Eg kanska fái Arnfrí› at koma framvi› at geva mær nøkur gó› rá› vi› á vegnum. Yngd ynskir teimum bá›um Nicolinu Rubeksen og Sólger› Joensen tilukku vi› úrslitinum og gó›a eydnu vi› finaluni tann 10. Juni.

### Í Vágum seinasta vikuskifti

Sum sagt fyrr í greinini, so var innlei›andi umfari› í Lognbrá leygarkvøldi›, ikki ta› fyrsta í kappingini. Seinasta vikuskifti var kappast vesturi í Vágum. Eisini úr vágum eydna›ist ta› tveimum gentum at ogna sær pláss í finaluni. Tær bá›ar eru Andrea M. Hansen, i› vann kappingina, og Ey›bjørt M. Simonsen, i› enda›i á ø›rum plássi. Eisini teimum bá›um ver›ur ynskt tillukku. Næsta innlei›andi umfari› ver›ur á Tvøroyri fríggjakvøldi›.